Álit

í

løgtingsmáli nr. 105/2025: Uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Margit Stórá, landsstýriskvinna í almanna- og bústaðamálum, hevur lagt málið fram 6. mai 2026, og eftir 1. viðgerð tann 8. mai 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. og 20. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Reyða Kross Føroya og landsstýriskvinnuna í almanna- og bústaðamálum.

Á vári 2025 stóðu nógvir burturriknir ukrainar brádliga og eitt sindur óvæntað til at missa sín bústað í Føroyum.

Fyri at tryggja, at hesi fólk ikki endaðu úti á gøtuni, var neyðugt at seta bráðfeingis skipanir í verk beinanvegin.

Landsverk fekk uppgávuna at útvega bráðfeingis bústaðir til hendan bólkin umframt uppgávuna at umsita og reka bústaðirnar.

Úrslitið varð, at avtala varð gjørd við stýrið fyri Føroya Barnaheim at leiga Barnaheimið í Havn, og eydnaðist sostatt at útvega øllum ukrainunum ein bráðfeingis bústað, áðrenn nakar teirra gjørdist heimleysur.

Tørvurin á bráðfeingis bústøðum hevur sveiggjað, men alt bendir á, at tørvurin á bráðfeingis bústøðum fer at vaksa aftur, tá summarið nærkast, og neyðugt er tí at fáa greiðari heimildir og meira skipaðar karmar rundan um bústaðirnar.

Undir viðgerðini er komið fram, at samstarvið millum stovnar, myndugleikar og felagsskapir hevur riggað væl, og at umstøðurnar á Barnaheiminum eru nøktandi.

Tó má staðfestast, at burturriknu ukrainarnir í dag ikki hava nøktandi atgongd til ymiskar grundleggjandi almennar skipanir í Føroyum, og at ukrainarnir tí ikki hava nóg góðan møguleika at fóta sær í landinum.

Fyri at loysa trupulleikan er neyðugt at víkja frá ymiskum treytum og í ávísan mun áseta serreglur á almannaøkinum.

Við hesum lógaruppskotinum kunnu ukrainarnir m.a. fáa barnagjald á jøvnum føti við føroyingar og tilboð um virknisvenjing, arbeiðsbúgving og leiðbeinara ísv. arbeiðfremjandi tiltøk.

Endamálið við lógaruppskotinum er sostatt at geva landsstýriskvinnuni í almannamálum heimild at víkja frá ymiskum treytum, soleiðis at ukrainarnir ikki detta niðurímillum grundleggjandi almennar

skipanir, og at geva Almannaverkinum betri amboð at hjálpa ukrainunum út á føroyska arbeiðsmarknaðin, og at varðveita teir á arbeiðsmarknaðinum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 23. mai 2026

Grímur Sundstein formaður	Sámal Petur í Grund næstformaður	Liljan Weihe
Sunnvá Dahl Høgfeldt	Magni Højgaard	Bjørt Lind
	Bjørg Brynhildardóttir Egholm	